


# SERLIG KUNNGERÐ

Øll, sum eiga at verða sett í skatt, skulu geva upp skattskylduga inntøku fyri 2009
– annars verður inntøkan mett og sekt áløgd

**TAKS-ráðið**



sí www.taks.fo

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

www.torshavn.fo

## DEILDARLEIÐARI OG ARKITEKTUR

**Søkt verður eftir deildarleiðara og arkitekti til Býarskipanardeildina.**

**ARBEIÐSUPPGÁVUR HJÁ DEILDARLEIÐARA:**

vera fyrst og fremst at hava dagligu leiðsluna á deildini um hendi.

Tín uppgáva verður, í samstarv við býararkitektin, at menna býarskipanardeildina soleiðis, at deildin fylgir við tíðini og broytist samsvarandi menningini í samfelagnum. Heildarætlan fyri kommununa, sektorplanlegging, menning av býarskipanaramboðum og ráðgeving eru týðandi fakmálsøki hjá deildarleiðaranum.

Tú kemur at fyrireika býarskipanarmál til nevndarviðgerð og ert við til at førleikamenna starvsfólkini.

**ARBEIÐSUPPGÁVUR HJÁ ARKITEKTI:**

- býarskipanir
- tvørfaklig sektorsamstarv við aðrar deildir fyrisiting og landsmyndugleikar
- samskifti við ráðgevarar og borgarar

Tórshavnar kommuna bjóðar eitt spennandi og dynamiskt arbeiðspláss við sjálvstøðugum, avbjóðandi og tvørfakligum uppgávum, har góðir møguleikar eru fyri fakligari og persónligari menning.

Deildin er samansett av fólkum við ymsum býarskipanarviðkomandi útbúgvingum, sum mynda arbeiðslagið, har arbeitt verður sum eitt toymi.

**FØRLEIKAKRØV TIL DEILDARLEIÐARAN**

Royndir sum virkandi arkitektur innan býarskipan og fyrisitingarroyndir er ein fortreyt.

Góð samskiftisevni, skal duga væl at samskifta munnliga og skrivliga á føroyskum, norðurlendskum og enskum. Góðir samstarvseginleikar eru ein fortreyt, eins og opinleiki fyri avbjóðingum og nýggjum møguleikum.

**FØRLEIKAKRØV TIL ARKITEKTIN ELLA FÓLK VIÐ VIÐKOMANDI ÚTBÚGVING**

Royndir innan býarskipan og verkætlanarstýring og fyrisitingarroyndir er ynskiligt.

Vit hugsa okkum, at tú ert framsøkin og dugir væl at samskifta munnliga og skrivliga á føroyskum, norðurlendskum og enskum.

**SETANARVIÐURSKIFTI**

Starvið sum deildarleiðari verður sett skjótast til ber og lønt í 35. lønarflokki samb. tænastumannaavtaluni (uttan at vera tænastumannastarv) ella sambært avvarðandi sáttmála.

Starvið sum arkitektur verður sett skjótast til ber og lønt sambært sáttmálanum millum Akademikarafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

**UMSÓKN**

saman við prógvum, viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera hjá Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi hósdagin 28. januar kl. 16.00.

**MEIRA FÆST AT VITA**

um starvið við at venda sær til Mikael H. Viderø, býararkitekt, á tlf. 211955, ella Jákup Egholm Hansen, tekniska stjóra, á tlf. 302010.

**– Lesið meira á torshavn.fo**

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER LANDSINS STØRSTA KOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja sera stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava eina nútímans og opnan leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta vit somuleiðis innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA